# Skips Sosialurin
## - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK




**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin Box 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgáva ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin


# ítróttur

Nr. 10 • hósdagur • 16. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Landsliðið riggar til

Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk

**Bridge-landsliðið til NM-kappingina, sum verður hildin í maimánaði er nú farið undir venjingar sínar**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*


*Balle Mohr, sum her sæst royna seg í dysti móti Marjun Restorff, hevði saman við Per Kallsberg ikki stórvegis trupulleikar av spælinum, sum vit hava valt hesa vikuna*

Opna føroyska bridgelandsliðið, ið skal leika í NM kappingini í Føroyum í mai 2003, hevði sína fyrstu venjing í Bridgehúsinum í Havn um vikuskiftið. Á odda fyri liðnum er navnframi danin Svend Novrup, ið eisini var venjari hjá liðnum, ið luttók í EM 2002, sum varð leikt í Italiu. Teir, sum venjarin hevur at velja millum eru:

Bogi Simonsen - Rói á Rógvu Joensen
Jóannes Mouritsen - Heðin Mouritsen
Gunnar Mouritsen - Høgni Vesturklett
Dánjal Pauli Mohr - Per Kallsberg

Vikuskiftið eydnaðist sera væl, leygardagurin fór nærum allur við at tosa um taktikk og psygologi. Sunnudagin varð skipað fyri venjaingardysti móti øðrum sterkum føroyskum spælarum. Nógv lærurík og spennandi spøl komu fyri, og her er eitt, ið ein royndir bridgespælari eigur at klára. Tað gjørdi Per Kallsberg eisini uttan nakran trupulleika.

| | | |
|---|---|---|
| N/- | 9 | |
| | 109653 | |
| | Qj4 | |
| | J862 | |
| 5 | | AKQ76 |
| KQ86 | | A72 |
| A10973 | | K85 |
| 975 | | 104 |
| | J108432 | |
| | J | |
| | 62 | |
| | AKQ3 | |

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| | Dánjal P. Mohr | | PerKallsberg |
| - | - | pass | 1ut |
| 2sp | 3hj* | pass | 3ut |
| pass | pass | pass | |

* = Lovar 4 lit í hjartara og noktar hald í spaðara.

Onkur lesari kann undrast á, at eystur ikki opnar við 1sp ístaðin fyri 1ut. Hetta er tí at hann ofta kann fáa trupulleikar við at melda aftur, eitt nú eftir at makkarin meldar 2kl.

Eftir at mótparturin hevur tikið fyri kleyvar ess, kong, frúgv og drong, var spælið sum ein opin bók fyri Per Kallsberg. Hann visti, at sunnan hevði minst 5 lit í spaðara, helst 6 lit av tí at kvaliteturin av litinum var so vánaligur, og at hann hevði 4 lit í kleyvara. Hann tók fyri sp ess, kong og frúgv og kastaði tveir rútarar av á borðinum. Norðan hevði nú ongan møguleika bæði at halda hjartaranum og rútaranum, og Per fekk soleiðis síni 9 stikk. Trupulleikin, ið ein meira óroyndur spælari hevur við hesum spælinum er, at hann oftast blendast av 5 litinum í rútara á borðinum. Hetta kann gera, at hann kastar ein rútara frá sínari hond, tá ið mótparturin tekur síni 4 kleyvara stikk.

### Føroya Bjór Simultan

Árliga Føroya Bjór simultan kappingin verður leikt nú leygardagin. Kappingin verður spæld samstundis á hesum, og byrjað verður klokkan 14.00: Klaksvík, Lonini í Fuglafirði, Gamla skúla í Miðvági, Bridgehúsinum í Havn og Bridge- og Billiardhúsinum í Vági.

Føroya Bjór kappingin er uttan iva ein av teimum mest umtóktu hjá Føroya Bridgesambandi, vanliga er luttøkan stór. Spælt verður við løgdum kortum í minsta lagi 27 spøl. Luttøkugjaldið er 50 kr fyri hvønn. Tilmelding er á staðnum.

### Steypakappingin

Nakrir dystir eru leiktir í steypakappingini, og vóru úrslitini hesi:
Jens Pauli G. Nolsøe vann móti Carl Mikkelsen við 95-56.
Eyðun Anthoniussen vann móti Jórun Johannesen við 52-128.
Per Kallsberg vann móti Jákup Hjaltalin við 82-48.

